FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

9. september 2022
Mál: 22/15622-2
(at tilskila í svari)

Svar til fyrispurning 52-023/2022 frá Aksel V. Johannesen, løgtingsmanni, um framleiðslu av svartkjafti til matna

Spurningar:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um, at størri partur av svartkjaftinum verður landaður til matna í framtíðini?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta krøv til vinnuna um, at ein partur av svartkjaftinum skal landast til matna?
3. Um so er, at landsstýrismaðurin ikki hevur neyðugu lógarheimildina til at krevja, at ein partur skal landast til matna, hevur landsstýrismaðurin so ætlanir um fáa heimildina til vega?

Svar:

Landsstýrismaðurin hevur valt at svara øllum trimum spurningunum undir einum.

Landsstýrismaðurin tekur av fullum huga undir við ynskinum um, at mest møguligt av svartkjaftinum verður virkaður til matna – antin umborð á skipi ella á virki á landi.

Í samgonguskjalinum eru flokkarnir samdir um, at vinnan skal hava góðar karmar, soleiðis at hon sleppur at virka eftir marknaðarbúskaparligum treytum, og at vit skulu hava eina fiskivinnuskipan, ið elvir til m.a. búskaparliga og vinnuliga burðardygd, sum hevur við sær mest møguliga virðisøking og menning í Føroyum.

Tað er landsstýrisins fatan, at heldur enn at hava ásetingar um, at ein ávísur partur av fiskinum – í hesum føri svartkjaftur – *skal* landast til matna, kann vinnan undir marknaðarbúskaparligum treytum tillaga seg soleiðis, at fiskurin verður avreiddur til ta framleiðslu, sum kastar mest av sær og á tann hátt stuðlar undir búskaparliga og vinnuliga burðardygga gagnnýtslu av fiskatilfeinginum.

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Tí er ikki hóskandi við ásetingum um, at fiskurin skal landast til ávísa framleiðslu/virking, og hevur landsstýrismaðurin tí ikki ætlanir um at tillaga lógarverkið soleiðis, at beinleiðis heimild er í sjófeingislógini fyri at seta slíkt krav.

Viðvíkjandi svartkjaftinum kann annars verða víst á, at tað eru skip og virki, sum virka svartkjaft til matna/frystingar. Gongdin seinastu árini hevur tó verið, at tað ikki hevur verið góður marknaður fyri hesi vøru. Tí er okkurt skip, sum var í hesi vinnu, selt, og virkini á landi hava í avmarkaðan mun tikið ímóti svartkjafti til virkingar/frysting.

Niðan fyri eru upplýsingar frá Vørn um, hvussu mikið av svartkjafti seinastu árini er landað til matna og fryst umborð.

Ár	*Landað til matna*	*Fryst umborð*	
2019	24.405	42.509	
2020	18.075	34.435	
2021	26.725	26.579	
2022	26.346	1.246	Til 1. september

Landsstýrismaðurin er vitandi um, at okkurt virki hevur ætlanir um at virka svartkjaft til surimi. Tað er tekin um, at tað á marknaðarbúskaparligum grundarlagi ber til at menna gagnnýtsluna av svartkjafti frá ídnað til matna.

Árni Skaale
landsstýrismaður